Sjónarmið

Hvat vilja føroyingar við Føroyum?



Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, sigur í Sosialinum hósdagin 29. sept., at nú má Nyrup gera upp við seg sjálvan, hvat hann og danir vilja við Føroyum.

Eg haldi, at tað er meira umráðandi, at føroyingar gera upp við seg sjálvar: **– Hvat vilja vit sjálvir við Føroyum?**

Nógv varð sagt í valstríðnum í summar um nýhugsan, at leggja burt gamalt klandur, at taka annað skinn um bak, osfr. Men er nakað veruligt komið burturúr?

Tað má sigast, at valið vísti, at nógv fólk vildu royna nakað nýtt. Men hóast hetta, so bleiv tað samlaða úrslitið so gruggut, at samráðingarnar um at gera nýtt landsstýri tóku meira enn tveir mánaðar, tí fólkaflokkurin spældi hund. Fólk fóru at spyrja aftur: **– Hvat gongur av teimum?**

Verkamannafylkingin kann hugsast at fara at geva politiska lívinum ein nýggjan stíl. Men henda fylking er ikki komin inn á pallin til ein annan og lættari gerandisdag. Samfelagsligi og politiski veruleikin er hin sami. Trupulleikarnir teir somu, bert skuldin og flytingin eru ikki sum fyrr, hesi tøl versna alsamt.

Tí undrar tað meg, at Jógvan sigur, at vil fylkingin varðveita reinar hendur, er beinleiðis lívsvandamikið at fara inn í tílíkar tingingar og gera neyðsemjur (citat). Er Fylkingin farin í Landsstýrið í teirri trúgv, at teir kunnu arbeiða har í fýra ár uttan nakrar neyðsemjur (kompromissir), so er okkurt galið.

Eg trúgvi lítið uppá, at Óli landsstýrismaður hugsar so. Hann, sum ongantíð hevur verið veruleikafjarur, hevur sum oftast funnið praktiskar loysnir, har hann hevur arbeitt.

Tað ljóðar sum Jógvan heldur, at Nyrup við dekret kann siga, at nú skal vælferðarsamfelagið í Føroyum avtakast. Ella, nú skal livifóturin í Føroyum vera tann sami sum í Danmark. Hetta man vera rættiliga fjart frá realitetunum.

Føroyingar noyðast sjálvir at skapa sítt vælferðarsamfelag, og higartil hevur mestsum øll týðandi lóggevingin á hesum øki verið føroysk. Men eitt, sum hevur styðjað tær føroysku royndirnar at liva í einum vælferðarsamfelagi, hevur hesi seinnu árini verið blokkurin. Ikki fiskablokkurin, men blokktilskotið. Ein milliard, prístalsregulerað, føroyingum at ráða yvir.

Hetta hevur higartil verið **tann mest stabili økonomiski faktorin** í føroyska vælferðarsamfelagum.

Jógvan heldur eisini, at um Nyrup sigur nei til eitt føroyskt vælferðarsamfelag (kann hann tað, og hvat vil tað siga???), so fer spurningurin um samband og sjálvstýri at taka seg upp aftur. Eg rokni við, (og skal heada málbering hava nakra meining), at Jógvan hugsar solciðis, at tað er spurningurin um loysing, sum fer at koma fram aftur. Men kanska fari eg skeivur.

Loysing?

Er ikki tíðin komin til at besinna seg???

Loysing avskaffar ikki uttanlandsskuldina, arbeiðsloysið, burturflytingina, kommunuskuldina, húsaskuldina og allar tvangsauktiónirnar. Loysing endurreisir ikki fiskastovnarnar, hon gevur ikki fleiri góðskaðar vørur, gevur ikki føroyingum betri prís á heimsmarknaðinum fyri fiskin ella ger føroyingar til drivnar handilsmenn. Loysing gevur ikki lægri rentu ella større kreditttrúvirði í útheiminum. Tvørtur ímóti. Blokkstuðulin fer nokk ikki at hækka við loysing, og eingin annar fer at geva føroyingum nakað sum líkist blokkstuðli.

Hvat hava føroyingar lært av kreppuni?

Hava teir, sum brúka munn (politikarar) veruliga lært nakað?

Eru nøkur sjónarmið, sum vístu seg at vera hvørvisjónir, blakað fyri borð, ella liggja hesar órealistisku ideologiir á goymslu í onkrum hálvtómum plátufrystara, klárar at tiðna upp, tá »betri« tíðir koma?

Politikkur er ikki bert at brúka munn, mangan loysir tað seg at halda munn.

Tíðin man vera komin til at besinna seg, og at taka veruleikan til eftirtektar. Føroyar eru ikki heimsins nalvi. Føroyingar eru ikki (næstan) heimsmeistarar í fótbólti ella nøkrum øðrum. Føroyingar framleiða ikki heimsins bestu fiskavøru. Føroyingar eru hvørki størstir, sterkastir, blíðastir, klókastir, kvikastir, mest vitandi, harðast arbeiðandi, bestu sjómenn, størstu kempur, mest genialir, mest skapandi.

Men – kanska kunnu føroyingar sigast at spæla í fyrstu division, har tað ræður um at vinna skuldarreyvasteypin, har tað snýr seg um vánaligt veðurlag, idiotiska bilkoyring og heimsins mest misháttu gongugøtu.

Føroyingar eru vanlig fólk.

Landið er pinkulítið, búskapurin er sera »smalur« og ógvuliga viðbrekin, tað duga øll saktans at sígggja við einum eyga í dag. Hetta er ikki bert nakað, sum skal sigast og takast upp aftur í heilum av politikarum og øðrum. Hetta skal veruliga »erkennast«! Møguleikin at skapa nýggjar vinnugreinir av týdningi er so avgjørt avmarkaður. Royndirnar hava higartil ikki verið serliga positivar. So kalt og kynist má tað sigast. Dreymahugsanin frá 80'unum, at føroyingar vóru nøkur »finn-uppámenniskju« av serligum kalibri, var sjálvandi følsk ideologi.

Síðani kríggið hevur Danmark ikki sett fót fyri. Heldur hin vegin kundi verið sagt, at danir kanska onkuntíð áttu at stoðga onkrum føroyskum ørvitis-projekti. Kanska áttu statsministarin og hansara menn at tikið til ordanna, tá ið Ráðgevandi Nevndin vísti á, at tann førdi politikkurin førdi beint út á blámman.

– Tað var politiskur meiriluti fyri tí –, siga teir, sum førdu orðið í 80'unum.

Kanska verður onkuntíð eisini politiskur meiriluti fyri at avtaka tyngdikraftina, ella at innføra tað góða, gamla geocentriska sólsystemið aftur. Men sovorðin tung mál fara nokk at krevja kvalificeraðan meiriluta.

Jógvan endar grein sína við hesum orðum: **– Fyrst av øllum mugu danir gera upp við seg sjálvar, hvat teir vilja við Føroyum –.**

Hví tað?

Hví er hetta: fyrst av øllum?

Hvat væntar Jógvan av hesi uppgerð?

Hvat skulu føroyingar sjálvir gera, meðan teir bíða eftir at danir gera upp?

Rolf Guttesen
5. oktober 1994

Tíðindaskriv frá Tøkum Lætt:

Lættur føroyskur dansur

Nú kvøldini gerast myrk og long fer føroyski dansurin aftur í ring. Felagið Tøkum Lætt, ið varð stovnað fyri einum ári síðani, bjóðar øllum áhugaðum at vera við. Málbólkurin hjá felagnum er serliga tey, sum ikki hava dansað so nógv føroyskan dans, men sum hava hug til tað. Fólk nýtast einki at duga frammanundan. Í felag verður avtalað, hvat skal lærast, og nógv av tí lætta verður havt á gólvi hvørt dansikvøld. (Harav navnið á felagnum). Miðað verður eftir, at skráin verður so fjøltáttað sum møguligt við styttri vísum og tættum, umframt teimum longru kvæðunum. Tiltakið er soleiðis eisini nakað fyri tey meira royndu. Dansað verður annaðhvørt sunnukvøld kl. 20 í Hornahúsinum í Havn. *Áhugað kunnu koma nú sunnukvøldið tann 9.okt.*

Øssur av Steinum vann kapping

Úrslitið av ritgerða-/savningarkappingini »Nótakast«, sum Fróðskaparsetrið lýsti í skránni 1992/93 gjørdist, at virðisløgnir nú eru latnar soleiðis:

1. virðisløn uppá 3.000 kr. fekk Øssur av Steinum, Kollafirði.

2. virðisløn uppá 1.000 kr. hvør fingu Jákup Pauli Nielsen, Vági, Jákup Olsen, Sandvík, og Egon Hansen, Tórshavn.

Hinir innsendararnir fingu bókagávu fyri luttøkuna.

Limir í dómsnevndini, ið metti avrikini, vóru D. J. Bærentsen, fv. landsdjóralækni, Jákup Reinert, fiskifrøðingur, og Jóan Pauli Joensen, rektari, og teir mettu alt tilfarið, sum innkomið er, scra áhugavert.

Fróðskaparsetrið hevur í skránni 1993-94 lýst við ritgerða-/savningarkapping við heitinum »Fiskarnir og nøvn teirra« og í skránni 1994-95 ber kappingin heitið »Jarðir og jarðanøvn«.

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1977/02
5. AFDELING

Orange obligationer med serienumre 8001-9000 og løbenumre 7001-8000 incl.
34. trækning oktober 1994

Følgende præmier er udtrukket

Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.	Serie	løbe nr.
1.000.000 kr.	8170	7855	8454	7109	8038	7494	8363	7756	8666	7901
8117	7148	8177	7543	8528	7882	8064	7772	8382	7178	8669	7934
		8231	7182	8567	7984	8075	7558	8384	7881	8690	7581
500.000 kr.	8270	7349	8591	7415	8095	7129	8393	7765	8695	7887
8465	7966	8307	7429	8644	7539	8097	7446	8397	7738	8699	7397
		8474	7777	8665	7237	8099	7718	8400	7101	8703	7011
250.000 kr.	8481	7037	8665	7286	8102	7586	8405	7723	8714	7282
8848	7784	8517	7020	8671	7889	8131	7131	8407	7186	8725	7279
		8611	7891	8676	7880	8135	7173	8411	7582	8739	7390
100.000 kr.	8619	7451	8688	7021	8143	7776	8429	7579	8762	7843
8662	7089	8680	7754	8695	7547	8149	7842	8430	7715	8765	7336
8972	7548	8686	7233	8711	7441	8162	7737	8437	7233	8776	7886
8977	7516	8693	7277	8719	7447	8163	7594	8461	7576	8785	7328
		8729	7185	8736	7646	8174	7572	8468	7327	8821	7902
50.000 kr.	8774	7619	8742	7022	8179	7928	8471	7702	8840	7208
8130	7760	8857	7093	8743	7907	8189	7128	8473	7752	8850	7277
8275	7480	8943	7615	8766	7845	8195	7169	8482	7828	8897	7712
8626	7309	8951	7323	8775	7417	8223	7390	8489	7478	8907	7378
8906	7743	8971	7871	8807	7253	8239	7259	8493	7788	8915	7613
				8826	7400	8239	7708	8494	7711	8917	7531
25.000 kr.				8834	7259	8247	7327	8498	7451	8918	7011
8018	7525			8841	7149	8250	7312	8521	7056	8926	7121
8132	7388	5.000 kr.		8851	7440	8254	7566	8523	7736	8934	7197
8134	7623	8058	7672	8890	7852	8286	7523	8567	7016	8935	7113
8265	7883	8083	7598	8948	7730	8303	7937	8577	7322	8935	7962
8423	7578	8159	7146	8952	7880	8308	7922	8582	7930	8935	7978
8575	7747	8163	7135	8966	7519	8310	7394	8586	7372	8938	7971
8643	7384	8206	7054	8974	7158	8322	7091	8596	8000	8961	7043
8673	7478	8251	7127	8984	7551	8334	7563	8599	7355	8966	7973
8800	7002	8286	7295			8339	7046	8610	7421	8968	7029
8993	7638	8298	7120			8343	7241	8629	7802	8973	7762
		8356	7411			8347	7734	8647	7142	8998	7433
10.000 kr.	8365	7680	1.000 kr.		8362	7596	8647	7583	8999	7811
8147	7518	8380	7335	8014	7368						

500 kr. Alle obligationer med løbenr. **7421** eller løbenr. **7443** uanset serienr.

Numrene på ikke indløste præmier fra de seneste fem trækninger vil, ligesom samtlige ovenstående numre, blive optørt i den officielle trækningsliste, som kan købes for 3,50 kr. i bladudsalgene. Trækningslisten vil ligge til eftersyn på alle posthuse.
Præmieudbetalingen finder sted i Danmarks Nationalbank og udvalgte posthuse fra d. 12. oktober d.å. Trækningslisten kan leveres på databærende medier ved henvendelse til DATA-SATS informatik A/S tlf. 42 52 21 00.

Kongeriget Danmarks Hypotekbank og Finansforvaltning
Landgreven 4, 1301 København K. Telefon 33 92 80 00.